# Ævintýreyðkenni

Her sært tú fýra týdningarmikil ævintýreyðkenni.




## 4 týdningarmikil ævintýreyðkenni

1. **Fólkaævintýr** byrja við "Einaferð var tað ..."
2. Í fólkaævintýrum er tað týðiligt, hvør er góður, og hvør er óndur.
3. Ofta hendir okkurt yvirnatúrligt í ævintýrum. Kanska er eitt trøll við í ævintýrinum, onkuntíð duga dýrini at tosa, og tað kann henda, at ein gomul kona dugir gand.
4. Í ævintýrum eru nøkur gandakend tøl, serliga er trítalið vanligt. Vit hoyra t.d. um tríggjar synir og tríggjar geitir. Høvuðspersónurin kann eisini hitta onkran tríggjar ferðir.

NEM í triðja, síða 181, 208